Noktar seg seka

Amerikanska kvinnan Colleen Rose (myndin), sum varð tikin í síðstu viku og skuldsett fyri at hava lagt ætlanir um yvirgang í Evropa og Asia, noktaði seg seka, tá hon kom fyri rættin í Philadelphia í gjár. Colleen Rose er millum annað skuldsett fyri at hava havt ætlanir um at beina fyri svenska blaðteknaranum Lars Vilks, sum hevur teknað eina umstrídda tekning av Muhammed profeti. Tann 46 ára gamla Colleen Rose er eisini kend undir navninum Jihad Jane, tí tað navnið brúkti hon á síni heimasíðu.

Hermenn royna sjálvmorð

Ein kanning, sum fakfelagið hjá teimum donsku hermonnunum hevur latið gera, avdúkar, næstan 300 danskir hermenn, sum hava verið í Balkan, Irak ella Afghanistan, royndu at taka lívið av sær, eftir at teir vóru komnir heimaftur. Kanningin, sum umfatar 303 fyrrverandi hermenn, vísir, at 281 hermenn royndu sjálvmorð eftir heimkomuna, og at 177 teirra gjørdu meiri enn eina roynd. Ein talsmaður fyri fakfelagið hjá hermonnunum sigur, at talan er um ein trupulleika, sum eingin hevur givið sær far um, og sum herurin ikki megnar at loysa einsamallur.

Samanleggingar skulu tryggja verandi undirvísingartilboð

Tað hevur bráskund at fremja bygnaðarbroytingar í skúlunum. Hendir onki nú, koma næmingarnir at rinda prísin, sigur landsstýriskvinnan í skúlamálum

SKÚLAMÁL
Rigmor Dam
rigmor@sosialurin.fo

Í hesum døgum liggur eitt uppskot í tinginum, sum hevur til endamáls at broyta fólkaskúlalógina, so vit ikki hava so nógvar smáar skúlaeindir, men, at landið verður skipað í færri og størri skúlaeindir.

Sambært landsstýriskvinnuni í skúlamálum, Helenu Dam á Neystabø, hevur tað bráskund at fáa framt hesa lógarbroyting, so til ber at fremja neyðugar bygnaðarbroytingar í fólkaskúlanum. Ikki minst nú stórar sparingar skulu fremjast á skúlaøkinum.

Við Sosialin sigur landsstýriskvinnan, at um vilji er til tess, ber til at fáa ein betri fólkaskúla fyri somu pengar. Men tað hevur stóran skund.

- Heldur verandi gongd fram, koma vit skjótt niður um eitt minstamark, har næmingarnir rinda prísin.

Mugu spara 9 milliónir

Niðurstøðan, sum landsstýriskvinnan er komin til er, at ongar bygnaðarbroytingar í fólkaskúlanum merkja færri tímar til næmingarnar. Og hon greiðir frá, at játtanin á fíggjarlógini til fólkaskúlan í 2010 er 276 mió.kr. Tað eru 5 milliónir fleiri enn í 2009.

- Men, skuldu vit hava sama virksemi í fólkaskúlanum í 2010 sum í 2009, so átti játtanin til fólkaskúlan at verið 285 mió. Sostatt er neyðugt at spara 9 milliónir við verandi støðu, sigur landsstýriskvinnan. Hon vónar sostatt, at lógaruppskotið um broytingar í fólkaskúlalógini fær eina positiva og konstruktiva viðgerð.

– Tí tað hevur einans til endamáls at tryggja okkara ungdómi tann besta skúlan, sum hon málber seg.

Aftur boð eftir sláimaskinuni

Sagt verður, at meginparturin av játtanini til fólkaskúlan fer til løn til lærarar, sum undirvísa eitt ávíst tímatal um vikuna.

- Í seinastu viku vísti eg í grein í bløðunum á, hvussu til ber at fremja bygnaðarligar broytingar, sum tálma framhaldandi útreiðsluvøkstri, og sum kortini menna skúlan. Men enn eru ongar bygnaðarligar broytingar framdar – so tí eru aftur boð eftir sláimaskinuni, sigur Helena Dam á Neystabø.

Hon greiðir frá, at seinastu útrokningarnar vísa, at frá 1. august 2010 til 31. desember 2010 er neyðugt at spara læraratímar svarandi til eina upphædd upp á 7 milliónir.

Stór avbjóðing

Úr Mentamálaráðnum er fráboðan farin út til allar skúlar um hetta, og sagt verður, at avbjóðingin verður stór – serliga á teimum stóru skúlunum, tí teir missa lutfalsliga mest.

- Enn halda vit øll lógarbundin krøv, og eitt nú tvílæraraskipanin er varðveitt. Men halda vit á fram at spara á henda hátt, endar tað við, at einki riggar væl. Og næmingarnir rinda prísin, ávarar landsstýriskvinnan.

Nýggir tónar frá skúlapultinum

Tá ætlanin um at leggja saman til sjey skúlaeindir varð løgd fram fyri einum ári síðani, var endamálið at leysgeva fleiri ressoursir til skúlaverkið. Vit líta aftur um bak…

SKÚLAMÁL
Rigmor Dam
rigmor@sosialurin.fo

Seinastu dagarnar hava vit hoyrt, at ætlanin hjá Mentamálaráðnum at leggja skúlar saman, hevur fingið eina nýggja vend. Nú skulu skúlar leggjast saman til tess at varðveita verandi støðið, og ikki, sum upprunaliga ætlað fyri at leysgeva meiri pengar og førleikar til skúlaverkið.

Hetta hevur eisini fingið ilt í Føroya Lærarafelag, sum upprunaliga stuðlaði undir ætlanirnar at leggja skúlarnar saman í størri eindir kring landið, til tess at økja um dygdina við fleiri útbúnum lærarum og tilboðum til næmingarnar. Nú hevur felagið so boðað frá, at tað tekur als ikki undir við ætlanunum hjá landsstýrinum, tí nú tykist endamálið bara vera rationaliseringar og sparingar.

Til dygd og nútímansgerð

Vit hava leitað bløðini fram frá februar í fjør, har landsstýriskvinnan í skúlamálum, Helena Dam á Neystabø, lanserar ætlanina. Og vit endurgeva úr blaðnum frá 6. februar 2009, har landsstýriskvinnan sigur soleiðis við Sosialin:

- Tað, sum vit vinna við at skipa Føroyar í skúlaøkir, skal brúkast sum íløga í dygd og nútímansgerð av skúlanum. Og so reksar hon eina rúgvu av fyrimunum við samstarvseindum upp:

- Fyri tað fyrsta manglar okkum nógvar útbúnar lærarar í skúlanum. Okkum vantar fjølbroytt eftirútbúgvingartilboð av lærarum. Eftirútbúgving átti at verið bæði eitt tilboð og eitt krav til øll, sum starvast í fólkaskúlanum. Tað er ein sera stórur tørvur á dagførdum undirvísingarmiðlum, bæði vanligum undirvísingarmiðlum og teldutøkum, eins og undirvísingaramboðum yvirhøvur. Nógvir skúlar lúka ikki krøv til nútímans frálæruhættir, og skúlabókasøvnini og námsligu verkstaðirnir eru ikki nóg góðir, segði Helena Dam á Neystabø.



Eitt dømi um skulaeindir

Skúlasamstar

ella skúlad

RIMMAR TILBOÐ

Vikuskiftis Sosialurin

Fakfeløg boykotta lønardumping

ÍSLENDINGAR GERA LANDSSJÚKRAHÚSID

SKIPA LANDIÐ Í SJEY STÓR SKÚLAØKI

67 sjúnigar: Klintrimús fer eftir metinum

Eg eri komin ratta landið

Stórt blað um útbúgvng

Tórshavnar Kommunubókasavn

Svend Krosstein

Ynskja betri tilboð

Magnus Tausen segði við Sosialin tann 5. februar 2009, tá málið um at leggja smáu skúlarnar niður, at endamálið má ongantíð vera at spara pengar, men at fáa størri gagn av játtanini. Hann orðaði seg soleiðis:

– Um ætlanin er at spara pening við at pressa fleiri næmingar inn í stovurnar og so annars bara at halda fram sum higartil, so er onki vunnið. Men um endamálið harafturímóti er at økja um dygdina, við at fleiri útbúnir lærarar vera um børnini og at størri eindirnar kunnu bjóða fleiri og betri tilboð, so er nógv vunnið.

Málið má vera, at vit varðveita hvørja einastu krónu innan skúlaverkið, men afturfyri brúka hana so væl, sum til ber.